Avdottin fólk og rúsdrekka-koyring

POLITITÍÐINDI

Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Av løgreglustøðini í Jónas Broncksgøtu frætta vit, at vikuskiftið sum heild hevur verið stak friðarligt. Einki serligt tiltak hevur verið, og hetta merkir løgreglan aftur, tí tá er ofta ikki so nógv at gera.

Tó so, tað heva verið fleiri inni og sovið rúsin av sær. Bæði fríggja- og leygarkvøldið var mestsum fult. Tey hava pláss fyri 4 fólkum at sova.

Vakthavandi greiðir frá, at tey fáa nógvar áheitanir frá fólki, sum tíðliga um morgunin finna avdottin fólk í garðinum ella í túninum hjá sær. Eisini fólk, sum eru á veg heim úr býnum og síggja fólk liggja avdottin, ringja til løgregluna at boða frá.

Umframt avdottin fólk, vóru eisini fýra dømi um rúsdrekkakoyring um vikuskiftið. Tveir førarar vórðu tiknir í Suðuroynni, ein varð tikin í miðstaðarøkinum og ein varð tikin í Eysturoynni.

Vakthavandi sigur, at allir førarar høvdu eina promillu, ið var yvir tað loyvda, og onkur kann vænta at missa koyrikortið. Blóðroyndir vórðu tiknar, og einki er tó vist fyrr enn blóðroyndirnar eru afturkomnar.

Løgreglan tók fýra fólk fyri at koyra ávirkaði í vikuskiftinum
Savnsmynd

Stór herferð ímóti royking

Fyribyrgingarráðið er nú farið undir eina herferð ímóti royking, nevnd "Mín besti vinur". Fleiri tiltøk verða í hesum døgum sett í verk, ið serliga eru ætlað børnum í 5. flokki

FYRIBYRGING

Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Tað verða ikki bert vanligu lýsingarnar á skránni, nú fyribyrgingarráðið fer undir nýggju herferðina ímóti royking.

M.a. er ein leikur gjørdur til endamálið, nevndur "Mín besti vinur", og ætlanin er at ferðast kring landið og spæla, inntil allir 5. flokkar í landinum hava sæð leikin. Leikurin verður framførdur inni í skúlastovunum hjá ymsu flokkunum.

Leikurin snýr seg um tvey børn, Nicotinu og Abstinensalon, ið bæði ganga í 5. flokki. Abstinensalon lokkar Nicotinu at roykja, og hóast hon ikki vil í fyrstuni, so er ikki vist, at hon er so stinn, tá alt kemur til alt. Leikurin er sermerktur á tann hátt, at áskoðarnir eru við til at stýra leikgongdini.

Tað eru Hjálmar Dam og Durita Dahl Andreassen, úr leikbólkinum Útskalda, ið framføra leikin. Birita Mohr er leikstjóri.

Byrjað verður mánamorgunin 10. september í Eysturskúlanum, og eftir tað verða 2 sýningar um dagin inntil allir 5. flokkar í landinum hava sæð leikin.

Umframt leikin fáa næmingarnir eisini 100 sms við royki og heilsuboðskapum, eins og lýsingar verða at síggja í sjónvarpinum. Ætlanin er eisini at fáa foreldrini við, og tí verður ein áheitan send til øll foreldrini um, at standa saman í herferðini ímóti royking. Klistrimerki eru eisini gjørd til herferðina. Tað er sostatt eitt rættiliga stórt tiltak, sum nú fer av bakkastokki.

www.murrr.fo

Ein heimasíða er eisini gjørd til endamálið, og hon varð løgd út á netið í morgun. Hon eitur Murrr, ið stendur fyri Matur Ung Royking Rúsevni Rørðsla, ið eru kjarnuevnini ið Fyribyrgingarráðið í høvuðsheitum arbeiðir við.

Á heimasíðuni sæst meiri um tiltakið. M.a. sæst leikætlanin fyri leikin, góð ráð til roykjarar um at leggja av, høvuðsreglur fyri roykiboðskapin, ið tey vilja hava børnini at skilja o.a. Heimasíðan fer at verða dagførd javnan, ímeðan tiltakið er.

Tað er umleið eitt ár síðani, at Fyribyrgingarráðið byrjaði at arbeiða við hesi ætlanini. Tey vendu sær til Fa. Veyhe, sum er navnframi Jákup Veyhe, og bóðu hann koma við uppskotum um, hvussu herferðin skuldi skipast. Komið varð fram til, at tiltakið, umframt at vera munagott, eisini skuldi kunna hava eitt ítøkiligt úrslit, sum skuldi kunna mátast. Kanningar vísa, at tey fyrstu longu byrja at roykja í 4. flokki, meðan tey allarflestu ikki byrja fyrr enn í 7. ella 8. flokki. Tískil er tað júst 5. flokkur, ið er valdur út.

Endurlýsing: Samferðsluleiðari

Søkt verður eftir leiðara til Samferðsludeildina at byrja skjótast møguligt

Samferðsludeildin
Høvuðsuppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almennu felagsferðsluna, herundir fólkaflutning og farmaflutning. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um felagsferðsluna á sjógvi og landi.

Arbeiðsøkið hjá deildini er millum annað: ferðaætlanir, prísskipan, útbjóðing, ferðaseðlaskipan, ferðslusamskipan, rutuuplýsing og farmaflutningur.

Uppgávan hjá leiðaranum
Leiðarin skal tryggja ein effektivan rakstur og stýra fíggjarligu karmarnir innan økið. Harumframt skal leiðarin tryggja eina framhaldandi menning av deildini.

Starvið er breitt og spennandi, har tú eisini kemur at arbeiða við fakligum uppgávum innan felagsferðslu, herundir analysur, planlegging og dagliga samskipan. Arbeiðið á deildini er í stóran mun skipað við verkætlanum.

Førleikakrøv
Vit rokna við, at tú hevur útbúgving innan búskap ella verkfrøði. Royndir innan flutningsskipanir og projektarbeiði er ein fyrimunur. Tú skalt kunna arbeiða málrættað, og tú hevur góð analytisk evni. Eisini er tað ein treyt, at tú hevur góðan telduførleika og góðan málsligan førleika. Tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevnir, og tú skalt kunna arbeiða undir trýsti og kunna hava nógvar bóltar í luftini í senn.

Setanartreytir og umsókn
Starvið er lønt í 35 lønarflokki hjá tænastumannafelagnum, tó uttan at starvið er tænastumannastarv.
Arbeiðstaðið er í Tórshavn til uml. 1. januar 2008, har tað síðan verður á Tvøroyri.

Umsókn v.m. skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-100 Tórshavn

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 12. septembur 2007 kl. 12:00.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Regin Vágadal, stjóra, á 343012.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.

Krabbasjúk í svárari pínu

Ein nýggj stór evropeisk kanning vísir, at viðgerðin fyri pínu hjá krabba sjúklingum langt frá er nøktandi

KRABBAMEIN

Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

8. september var eitt nýtt kanningarúrslit lagt fram í Danmark. Kanningin, ið hevur fingið navnið EPIC – European Pain in Cancer, vísir, at annarhvør krabba sjúklingur í Danmark livir við stórari pínu.

Við í kanningini eru 5.000 evropeiskir krabba sjúklingar úr 12 ymsum londum. Og myndin tykist vera hin sama í øllum Evropa. Viðgerin fyri at fáa bilbukt við krabban gerst alsamt betri, men lítil dentur hevur verið lagdur á at minka um pínuna hjá sjúklingunum. Nógva pínan hevur eina sera ringa ávirkan á lívsgóðskuna, og á sambandið við familjuna. Fleiri av sjúklingunum siga, at umheimurin als ikki skilir, hvussu svárari pínu tey í roynd og veru eru í.

Nógvir av krabbasjúklingunum kundu saktans hildið á at arbeitt, hóast tey eru sjúk av krabba, men nógva pínan ger tað ómøguligt hjá nógvum sjúklingum.

Framstig eru gjørd innan pínuviðgerð, men hetta verður ikki raðfest nóg høgt av teimum flestu sjúkrahúsunum, sigur Mads Werner, ið starvast á onkologisku deild í Lund í Svøríki.

Gongda leiðin er, sambart Mads Werner, at taka pínuna í álvara og bøta um viðgerarmøguleikarnar á donsku sjúkrahúsunum. Starvsfólkið á sjúkrahúsunum eiga eisini at verða betri útbúgvin tá tað kemur til pínuviðgerð, heldur hann.

Kanningin er tann størsta, ið nakrantíð er gjørd av sínum slag.